# Nógv tiltøk í Vágum

**Nógv hendur í Vágum um vikuskiftið. Vágatunnilin er ókepis og í samband við tað spíla vágafólk seg út við alskyns tiltøkum**

VIKUSKIFTIÐ

*Inna Tørnroos*
*inna@sosialurin.fo*

Tunnilin er ókeypis frá kl 06.00 leygardagin 18 februar til kl 06.00 sunnudagin kl 19 februar.

Handlarnir í Vágum hava leingi opið leygardagin. Matvøruhandlarnir stongja kl 17.00 meðan alllir hinir hava opið til kl 20.00.

Àrliga tiltakið hjá Lions Club Vágar verður í ítróttarhøllini á Giljanesi leygardagin. Tiltakið plagar at vera hildið føstulávints sunnudag, men er í ár flutt. Tiltakið er samstundis eitt sindur broytt í mun til tað siðbundna.

Tað byrjar klokkan 17 við at formaðurin í LC Vágum, Dánjal Christoffersen bjóðar vælkomin, samstundis byrjar eisini mattombola og kaffiborð við køkum har til ber att keypa sær ein kaffimunn.

Klokkan 18.00 letur stórt fiskaborð upp í fimleikarøllini, har Uni Gullfoss, kokkur, fer at borðreiða við nógvum ymiskum køldum fiskarættum.

### Brandur Enni syngur

Tey, sum ikki eru so svong hava møguleika fyri at hoyra Brand Enni syngja inni í ítróttarhøllini. Tann framførslan byrjar eisini klokkan 18.00.

Klokkan 18.30 byrjar bamsutombola, og klokkan 18.45 verður farið undir afturvendandi eydnuhjólið, sum vanliga hevur verið tað berandi á Lions tiltakinum á Giljanesi.

Klokkan hálvgum átta byrjar mattombola, og ein hálvan tíma seinni, klokkan 20.00, fer Magni Christiansen at syngja á pallinum í høllini. Tiltakið heldur fram til klokkan 23.00.

Atgongumerkið kostar 20 krónur og er samstundis lutaseðil um eina flogferð. Drigið verður, tá tiltakið endar. Til at sleppa til stóra fiskaborðið í fimleikarhøllini krevst eisini serstakt atgongumerki á kr. 150,-.

### Sangløta

Kirkjan í Miðvági skipar fyri afturkomandi tiltakinum „Syngið við“. Tiltakið hevur fýra ár á baki og er blivit so væl dámt at fyrireikararnir hava verði noyddir at flyta úr Missiónshúsinum og inn í Miðvágs kirkju har betri pláss er.

– Tað hava verið eini 120-150 fólk hvørju ferð vit hava skipað fyri hesum, sigur Svein Thomasen, sum er ein av fyrirekarunum.

Hetta er fyrstu ferð tiltakið er í samband við at Vágatunnilin er ókeypis. Ungdómskórið og Manskórið úr Vágum fara eisini at luttaka. Tiltakið byrjar kl 20.00, og bæði vaksin og børn eru vælkomin at tríva í ein av teimum kendu missiónssangunum, heilsa fyrireikarirnir.



*Lions Club í Vágum skipar fyri tiltaki› á Giljanesi leygardagin*



*Vágatunnilin er ókeypis allan leygardagin*

# Skipan av framtíðar eftirlønar- og tryggingarmarknaðinum

**Búskapar- og løgfrøðingafelag Føroya skipar í kvøld fyri einum »Kveikjandi kvøldi um skipan av framtíðar eftirlønar- og tryggignarmarknaðinum«**

EVNISFUNDUR

Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya skipar nú fyri enn einum áhugaverdum evnisfundi.

Kveikjandi kvøld um skipan av framtíðar eftirlønar- og tryggingarmarknaðinum í Føroyum, verður mikukvøldið 15. februar kl. 19.30 á Hotel Hafnia.

### Á skránni verður:

- Marner Jacobsen, stjóri í Føroya Sparikassa, og limur í arbeiðsbólkinum, ið gjørdi frágreiðingina »Dynamikkur á kapitalmarknaðinum« í oktober 2005, fer at hava framløgu um, hvørji átøk hann metur verða neyðug fyri at menna føroyska eftirlønar- og tryggingarmarknaðin.
- Palli Petersen, ið er limur í nevndini, ið fylgir við einskiljingini av LÍV, hevur framløgu um, hvørja loysn hann metur verða rættast, tá umræður einskiljing av lívstryggingarfelagnum LÍV v. m.
- Bárður Nielsen, landsstýrismaður í eftirlønarmálum v.m., fer at greiða frá, hvørjar loysnir kunnu hugsast tá umræður eftirlønarøkið í Føroyum.
- Møguliga fer Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í tryggingarmálum v.m., at greiða frá hvørjar ætlanir hann hevur, tá umræður føroyska tryggingarmarknaðin og LÍV.
- Pallborð, ið svarar spurningum.

Hetta skuldi borgað fyri góðum kjaki um, hvussu vit best skipa eftirlønar- og tryggingarmarknaðin í Føroyum framyvir, heldur Búskapar- og Løgfrøðingafelagið.

Føroyar eru eftirbátur tá umræður at skipa eftirlønarøkið, og stendur føroyski tryggingarmarknaðurin framman fyri stórum avbjóðingum, tá latið verður upp fyri kapping mótvegis Íslandi og øðrum útlondum.

Menning av føroyska eftirlønar- og tryggingarmarknaðinum er tí eitt sera viðkomandi mál, ið hevur stóran týdning fyri føroyska samfelagið, og vónar BLF, at felagið - við almennum fundi um hetta evni - kann vera við til at fáa eina gjølla viðgerð av málinum, fyri soleiðis vera við til at tryggja, at rættar avgerðir verða tiknar nú og framyvir.

Tiltakið er alment – og eru øll hjartaliga vælkomin, heilsar Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya.